## VIÐMERKINGAR

# Vil Føroya fólk hava eina trygga framtíð?

**Fríðálvur Jensen**
*valevni Sambandsfloksins í Suðursteymi*



Ella er tað soleiðis at vit skulu hava ein hasard-politikk her á landi – við eini skerjing í vælferðini. Er tað ikki betri við einum skilagóðum og hóvligum politikki, og einum almennum húsarhaldi, sum livir eftir evnum – fólkið velur!

Tá vit stríddust til seinasta løgtingsval, fall tað mær mangan fyri bróstið, at nú skuldi tann føroyska skútan beinast inn á eina fullveldiskós, uttan at fólk fingu svar uppá, hvat hetta kom at kosta, og hvussu eitt fullveldi kom at ávirka føroyska samfelagið.

Mín meining tá var tann sama sum nú, at tað tóktist at vera eitt rák av bankamálinum og ein kensla av romantikki, sum nú skuldi fáa Føroya fólk burturúr ábyrgdarloysinum og eyðræningini frá danskari síðu, og so kann fólkið spyrja, hvat kom av skafti í so máta.

Eg minnist eisini orðini, sum vórðu søgd um tey, sum royndu at halda eitt sindur aftur, at hesi vildu onki, og at tey bara sóu myrkur, og onki annað.

Nøkur økir, sum hava nú ligið undir hesi harðrendu fullveldiskósini:

- Heilsuverkið – hvør minnist ikki kjakið um sjúklingar, sum vórðu sendir til hús í úrtíð, og at nógvir av bygningunum eru í so vánaligum standi, at hesir eru til vanda fyri sjúklingar og starvsfólk
- Almannaverki – hvør minnist ikki orðini um at hjálpa teimum veiku við fleiri sambýlum, ellisheimum o.ø., og at almannaveitingarnar skuldu uppá sama støði, sum í okkara grannalondum
- Bústaðarøkið – hvør minnist ikki lovorðini um ein skipaðan bústaðarpolitikk

- og soleiðis kundu vit hildi áfram!

Fólkaflokkurin, sum altíð førir seg fram, sum tann einasti veruligi borgarligi flokkurin í Føroyum, hevur nú í 4 ár tosað um eina sokallaða FÓLKATRYGGING, men hvar bleiv hon av, var tað bara nakað tit brúktu í tykkara valstríði seinast, ella hvussu bleiv?

Tjóðveldisflokkurin skuldi, sum vit jú vita, leggja størsta dentin á at fáa greiðu á tí politiska óskili, sum hevði valda, tí nú skuldu vit skipa okkum sjálvi, men hvat er komið av skafti í so máta – jú, øktar almennar útreiðslur til serfrøðingar o.a., sum kostar tí føroyska skattgjaldaranum í milliónavís av krónum, sum t.d. kundu verið nýttar til omanfyri nevndu økini.

Sjálvstýrisflokkurin kom, sum ketta upp úr høvdatrogi, og skuldi eisini leggja seg eftir at útvega føroyingum okkurt, sum líktist eini FÓLKATRYGGING, men skili er tað sama – onki kom.

Her eru bert nakrar av teimum avleiðingum og teirri raðfesting, sum hetta landsstýri hevur staðið fyri hesi seinastu 4 árini – tí nú skuldi alt snúgva seg um tað eina – fullveldi!

Nei, lat okkum fáa annað fólk framat, soleiðis at skil kemur á, og at vit raðfesta omanfyri nevndu økini høgt, soleiðis at tey veiku veruliga fáa hjálp, og at vit húsast við skili, soleiðis at tann føroyski búskapurin tolir eina niðurgongd – uttan at hetta gongur útyvir vælferðina.

# Sosialliberali mentaði miðflokkurin, ið bæði hevur flogið og vil

**Jónas Johnsson**



- at samla fólkið fyri hægstu virðum lívsins og sýna politiska ábyrgd í øllum lutum
- at í Føroyum skulu føroyingar ráða og byggja land
- taka fulla ábyrgd og fult ræði, stig fyri stig, í øllum viðurskiftum okkara
- raðfesta borgaran, herundir sjúk og veik, framum betong, asfalt, stál og annað kalt
- miðvíst vísa á borgaravinarligar loysnir, skilvíst frælsi og rættskafni í øllum lutum
- varðveita og betra skilagóð og virðilig sambond við onnur lond – til fólksins gagn
- arbeiða fyri tí góða lívinum við byrðadyggari vælferð – ikki einstaka ideologi
- slætta um vinstra-høgra sjaskið og virka sum politisk miðleingja
- mótvirka býttum yvirdirvi og skammuligum afturhaldni frá politiskum íspólum.

Av hesum mugu øll skilja, at: uttan umboð floksins á tingi fer Føroyaskútan at rulla illa.

**Oljan ið slættar og smyr**

Tíðindini um olju longur niðri enn væntað, væl goymd í basalti, kunnu verða gott nýtt. Einki er likið út. Upprunaligar risagoymslur eru kanska varðveittar. Váðafýsnið økist og tøknin mennist. Bara nakrir eyka metrar at bora – eingin forðing.

Kanska eru olju-dinosaurar undir Føroyum. Men omaná eru so heilt víst flokkar, ið hava tikið okkara sjálvstýrispolitikk til sín. Teirra skráir miseydnaðust totalt – ár eftir ár og í 98. Abbaflokkur kann vinna seg til deyðis, men alt fleiri stúra missin av meistrandi klípinum – úrmælingunum. Tí kemur hann styrktur av váli hesaferð. Nógv verða borin av angist og velja tað ósømiliga, ið er sáað í sambandskari herferð. Men fleiri síggja mjólkandi neytakonurnar órodnar skonkja annað manns mjólk – og jólamennirnar, ið vilja geva gávur, men sjálvir maka sær, meðan danin sveittandi rindar. Teir kalla tað »rættindi« og tosa so samvitsku-persiennurnar niður, um nakar gluggi skuldi ljósa eitt sindur á tapetinum hjá teimum.

Sjálvstýrisflokkurin er fyri virðiligheit, arbeiðssemi og tekur við ábyrgd undir ábyrgd.

Allir rópa sjálvstýri í dag, men uppruna sjálvstýrisvongsins eigur Sjálvstýrisflokkurin og hann hevur tær óspiltu ílegurnar.

Borið djúpt, rakið rætt, veljið Sjálvstýrisflokkin.

# Løgfrøði er sjálvræði

**Jógvan Arge**
*Valevni tjóðveldisfloksins í Suðurstreymi*



Eitt av aðalmálunum hjá tjóðveldisflokkinum er at fáa dómstólar, rættarskipan og løgreglu á føroyskar hendur. Hetta er í fullum samsvari við løgtingssamtyktina um sjálvstýri Føroya fólks.

Tá alt kemur til alt, er hetta hitt týdningarmesta málsøkið í allari sjálvstýristilgongdini.

Uppi í hongur spurningurin um at skipa rættarsamfelagið Føroyar og spurningurin um rættartrygdina hjá føroyingum.

Tað hevur alstóran týdning, at føroyingar koma beinleiðis upp í arbeiðið við øllum hesum týdningarmiklu málum, sum í dag eru á donskum hondum burturav.

Tað er umráðandi, at vit menna okkara løgfrøðiliga kunnleika, okkara kunnleika til at viðgera lógir og skipanir og á tann hátt gera okkum út til at sita fyri dómstólum, ákæruvaldi og løgreglu.

Vit eiga eisini at gera nógv burturúr at undirvísa í løgfrøði í Føroyum. Ikki minni eiga vit at gera burtur úr gransking á hesum øki.

Grannar okkara fyri vestan hava tann lærusetning, at løgfrøði er sjálvræði. Hendan niðurstøða er runnin úr sjálvsstýrisstríðnum hjá íslendingum fyri eini øld síðani. Vit eiga at leggja okkum teirra orð í geyma.

Eftir tógvið stríð við danir fingu íslendingar egnan lógskúla í 1908. Teir fóru miðvíst at granska egna søgu og rættarstøðu, og næmingar úr hesum skúla førdu orðið, tá íslendingar samráddust um fullveldi í 1918.

Tað var íslendinga egni serkunnleiki, sum gjørdi, at teir vunnu samráðingarnar, so fullveldi Íslands kundi setast á stovn í 1918.

Íslendsku royndirnar siga eisini, at skalt tú menna tína egnu skipan, kanst tú ikki nýta embætisfólk, sum bert er skúlað í øðrum skipanum. Neyðugt er at hava fólk í fyrisitingini, sum eru skúlað í teirri skipan, tey skula umsita og virka í.

Tjóðveldisflokkurin virkar fyri veruligum frambrotum á hesum øki, og tí er farið er undir fyrireikingar til at taka hesi málsøki yvir.

Onki er meira sjálvsagt fyri eina tjóð, enn at hon smíðar og umsitur sínar egnu lógir og rættarskipan.

# Komandi samgonga

**Høgni Mikkelsen**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy*



Oddagreinin í blaðnum hjá Javnaðarflokkinum hevur við ávísum millumbili skrivað og gitt um, hvussu ein komandi samgonga kemur at síggja út. Hesar gitingar bera boð um, at Javnaðarflokkurin er í eini tvístøðu.

Tann eina oddagreinin vísir á tveir samgongumøguleikar, nevniliga:

A. Javnaðarflokkurin, Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin

B. Javnaðarflokkurin, Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin

Javnaðarflokkurin vísir her á eina loysingarsamgongu ella á eina samríkissamgongu. Hvussu kann flokkurin bæði brúka loysing og samríki?

Beint eftir at úrslitið av fólkatingsvalinum var greitt, segði formaður Javnaðarfloksins í sjónvarpinum, at stundin nú var komin til at tosa minni um loysing ella samríki og ístaðin heldur at tosa meira um høgra- og vinstrapolitikk.

Í sambandi við seinastu veljarakanning segði formaður Javnaðarfloksins í Útvarpinum, at kanningin vísir á nógvar samgongumøguleikar. Men skulu vit hava eina sterka samgongu, sum hevur breiða undirtøku í fólkinum, so sum Javnaðarflokkurin eisini hevur tosað og skrivað um, so kann eg bert síggja tveir møguleikar, nevniliga eina loysingarsamgongu ella eina samríkissamgongu, so nógv bendir á, at Javnaðarflokkurin framvegis er í eini tvístøðu, tá talan er um samríki ella loysing.

Men longu aftur í kvøld hevði formaður Javnaðarfloksins nýggj signal í sjónvarpinum. Nú sigur hann, at tað kortini helst verður ein samgonga millum Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin.

Hví eru útmeldingarnar so skiftandi ? Og hví brúkr formaður Javnaðarfloksins so nógva orku til at fáa ein fyrrverandi loysingarleiðara inn í flokkin?



## VIÐMERKINGAR

# Tørvur á miðvísum heilsupolitikki

**Leivur Hansen**
*Tjóðveldisvalevni í Suðurstreymi*



Í grannalondum okkara verður stórur dentur lagdur á at hava ein miðvísan heilsupolitikk.

Hesin politikkur verður við jøvnum millumbilum tikin upp til umrøðu og endurskoðan, soleiðis at hann altíð samsvarar við tíðarinnar ynski og krøv.

Í Íslandi td. arbeiða tey við tílíkum langtíðarætlanum, sum røkka minst tíggju ár fram í tíðina.

Í Føroyum hava vit ongan veruligan heilsupolitikk, hóast røddir mangan hava verið frammi um tað.

Hetta hevur eisini verið afturvendandi hjartasuff frá landslæknanum í ársfrágreiðingum hansara seinastu mongu árini.

Í eini sjónvarpssamrøðu fyri nøkrum mánaðum síðani um sama evnið, endurtók landslæknin áheitan sína á politikararnar um at geva hesum máli størri ans.

Hetta ikki minst við atliti at ósunna kostinum, ið børn okkara fylla seg við í dag, við teimum persónligu einsvæl og samfelagsligu avleiðingunum, ið standast av hesum.

Sum eina roynd at eggja serliga teimum eldru skúlabørnunum í kommununi at eta sunnan og heilsufremjandi mat, skjeyt undirritaði sum býráðslimur í fjørsummar upp, at býráðið skipaði fyri einum roYndartiltaki við hesum sum endamáli.

Viðmerkjast kann í hesum sambandi, at Tórshavnar kommuna frammanundan veitir 300 tús. kr. í stuðuli um árið til vælumtóktu døgurðaskipanina hjá røktarheiminum Lágargarði, sum einir 130 heimabúgvandi pensjonistar í kommununi dagliga hava gleði av.

Uppskotið um sunnan skúlamat hevur í heyst og vetur verið til ummælis hjá teimum átta skúlastýrunum í kommununi, og væntandi verður ein politisk avgerð tikin í málinum í næstum.

Persónliga haldi eg ikki, at tað hevði verið av leið, um landið - sum lið í einum skipaðum og miðvísum heilsupolitikki - gekk undan við at fáa eina hugburðsbroyting í lag á hesum øki.

Soleiðis sum gjørt verður í fullum álvara í grannalondum okkara.

Har verður arbeitt miðvíst við at fáa børnini í fólkaskúlunum at halda uppat við at eta pizza, burgarar, chips, cola og annan ósunnan mat til døgurða.

Orsøkin er, at fleiri kanningar hava staðfest, at ósunnur kostur hevur beinleiðis ávirkan á atferðina og innlæringarevnini hjá børnunum.

Sambært bókini "Kost, Adfærd og Indlæringsevne", sum danin Frede Brauner gav út herfyri, stava atferðar- og koncentratióstrupulleikar hjá mongum børnum aloftast "bert" frá skeivum mati, lágum blóðsukri og møði.

Maturin er alt ov týdningarmikil til, at vit leggja ábyrgdina á børnini ella tineygjararnar, sigur Frede Brauner. Tí er tað eisini ógvuliga avgerandi, at skúli og frítíðarheim taka teirra ábyrgd í álvara, meðan børnini eru í teirra varðveitslu, sigur hann.

Hann heldur, at tað almenna ikki kann gera eina betri íløgu enn at fáa óhepnu kostvanarnar hjá børnum broyttar. Í hesum sambandi vísir hann á, at meginparturin av teimum fýra miljardunum, ið brúktar verða til serundirvísing og skúlasykologar í Danmark í dag, kundu verið spardar, um børnini ikki høvdu etið skeivan mat.

Ongin veit reiðiliga, hvussu statt er á hesum øki í Føroyum. Men at vit hava og fáa líknandi trupulleikar at dragast við her heima, skerst ikki burtur.

Tí eiga skúlastýrini, kommunustýrini og løgting og landsstýri at taka málið í fullum álvara og meðvirka til at seta í verk góðar matskipanir. Flestu foreldur vilja fegin rinda fyri tað, sum gagnar heilsuni og skúlagongdini hjá børnum teirra, samstundis sum tey sleppa undan baksinum við matpakkunum.

Skúlabørn skulu eta sunnari. Skeivur matur skapar taparar.

# Vælferðin skapast í Føroyum

**Gestur Hovgaard**
*valevni Tjóðveldisfloksins í Suðuroynni*



Heimastýrisfólk tvíhalda um, at danskir pengar tryggja okkum vælferðina. Eru hesir pengar ikki til taks, sita vit aftur við tarablaðnum í munninum, er ikki óvanligt at hoyra. Sannleikin er, at vælferðin kann ikki tryggjast við pengum og skipanum frá einum øðrum samfelagi. Hetta kann bara gerast við at skapa og skipa vælferðina við støði í egnum fortreytum.

Vituligt er, at nógvir pengar skulu til at reka eitt nútímans vælferðarsamfelag. Tjóðveldisflokkurin er eisini til reiðar at brúka teir pengarnar ið skulu til. Hetta sæst í tí veruleika, at seinasta valskeiðið eru m.a. pensjónirnar hækkaðar meiri enn nakrantíð, nýggj barnsburðarskipan sett í verk, nýtt landssjúkrahús er í gerð v.m. Ongantíð er meiri brúkt uppá vælferð, og íalt hava almanna- og heilsumál fingið 416 milliónir meiri í hesum valskeiðnum.

Onki er lættari enn bara at lova uppaftur fleri pengar, soleiðis sum kappast verður um nú uppundir valið. Men hetta er og verður ábyrgdarloysi. Pengafloymurin ígjøgnum 80'ini prógvaði júst, at tú kanst fáa minni vælferð, tá hon ikki er framd við umsitingarligum skili. Í dag verður nógv størri partur av hvørjari krónu hjá tí almenna brúktur uppá vælferðina, enn gjørt var í teimum "góðu" 80'unum.

Spurningurin er tí ikki bara, hvussu nógvir pengar verða brúktir uppá vælferð. Spurningurin er, hvat tú sum borgari fært fyri tær krónurnar, brúktar vera. Menningin av vælferðini er tí fyrst av øllum ein menning av okkara umsitingarliga førleika á øllum økjum. Tjóðveldisflokkurin er eisini til reiðar at føra hesa ábyrgdina longur ávegis.

Grundarlagið fyri umsitingarligum skili er ein skipaður vælferðarpolitikkur, har dentur næstu árini eigur at verða lagdur á:

At betra røktarskipanina, serliga røktarheimstørvin.

At fáa ein skipaðan bústaðarpolitikk, serliga fyri ungar familjur.

At fáa ein skipaðan barnapolitikk, herundir ansingartrygd og longt farloyvi.

At menna sjúkrahúsverkið soleiðis, at alt landið hevur fullgóða tænastu.

Besta trygdin fyri vælferðarsamfelagnum Føroyar er ein politikkur, har sosial menning og búskaparlig ábyrgd fylgjast. Seinastu árini prógva, at hesa trygdina veitir Tjóðveldisflokkurin.

# Skal gerast lættari at gerast íbirtari

**Kristina Háfoss**
*Valevni Tjóðveldisfloksins*
*www.hafoss.com*



Føroyska vinnulívið er ein av hornasteinunum í føroyska samfelagnum og er tað ikki nøkur sjálvfylgja, at vit í dag hava eitt vinnulív. Hetta vinnulív er sprottið úr einstaklingum, ið hava havt dirvi og áræðið til at gerast íbirtarar og harvið at fara í holt við egið vinnuvirksemi. Føroyar hava tørv á tílíkum einstaklingum og eigur ein enn meira málrættaður politikkur verða lagdur til rættis, til tess at birta áhugan millum enn fleiri føroyingar at gerast íbirtarar.

**Skapa íbirtaraanda**

Áhugin fyri, at gerast íbirtari er ikki nakað, ið kemur eftir einum degi. Skulu vit hava ein betri íbirtarahugburð millum føroyingar er rætt, at útbúgvingarverkið longu frá børn eru í ungum aldri stuðlar ungum í, at gerast íbirtarar. Hetta kann eitt nú gerast við at skapa tættari bond millum fyritøkur og útbúgvingarskipanina, við at skipa fyri fleiri "Business-games", undirvísing innan íbirting eitt nú við at læra tey ungu reiðskap, ið skal til, til tess at kunna gerast sjálvstøðugur vinnurekandi o.s.fr.

**Meira váðafúsan kapital**

Væntandi váðafúsi kapitalurin er ein tann stórsta forðingin fyri nógvar føroyskar íbirtarar. Nógvir føroyingar liggja inni við góðum hugskotum, men uttan neyðugan kapital kunnu hesi hugskot ikki gerast veruleiki. Bankarnir skulu hava ávísa trygd og hevur ein íbirtari ikki hesa, er ikki møguleiki fyri at fáa fígging.

Tað vildi uttan iva verið ein sera góð íløga í føroyska búskapin og samfelagið sum heild, at seta á stovn ein grunn, ið er fúsur at fíggja áhugaverd hugskot í byrjanini soleiðis, at hesi kunnu fáa møguleika fyri, at síggja dagsins ljós og vónandi mennast til eina framtíðar vinnu í Føroyum. Vit hava í dag ikki nakran grunn, ið kann veita nóg váðafúsan byrjunarkapital og átti peningur verið settur av á hvørjum ári til tílíkan íbirtaragrunn. Møguleikin fyri at fáa fígging úr tílíkum íbirtaragrunni eigur at gerast munandi lættari enn úr núverandi vinnuframa- og framtaksgrunnum og eigur ein íbirtaragrunnur at fáa eitt avkast av íløgum sínum, um íbirtarans fyritøka gerst ein stinn fyritøka við yvirskoti.

Peningur í ein íbirtaragrunn er peningur, ið samfelagið fær aftur fleirfalt í longdini.

Ein føroyskur virðisbrævamarknaður fer óivað at bøta um trupulleikan við váðafúsum kapitali, men tað fer framhaldandi at verða trupult fyri íbirtarar at fáa pening til at byrja eina fyritøku.

**Færri forðingar**

Ongin ivi er um, at ein hornasteinur fyri, at fáa fleiri til at fara í holt við at gerast íbirtarar er at beina burtur forðingar og í staðin skapa rættar fyritreytir og karmar.

Í dag eru karmarnir ikki nóg rúmligir fyri íbirtarar. Hóast positiv stig eru tikin seinastu árini við meira ráðgeving til íbirtarar, KT-klekingardepli og lægri partafelagsskatti, so er enn nógv, ið kann gerast betur. Ov nógvar útreiðslur og pappírsarbeiði eru enn av at stovna og reka fyritøku og er hetta ikki bert við til at gera áhugan fyri íbirting minni, men somuleiðis ávirkar hetta búskapin og kappingarevni hjá vinnulívinum skeiva vegin.

Sum heild er neyðugt, at gera tað lættari at gerast íbirtari.

- Lóggávan á vinnulívsøkinum skal sum heild verða endurskoðað til tess, at beina burtur allar óneyðugar umsitingarligar byrður
- Mannagongdin í sambandi við stovning av fyritøkum skal gerast einklari
- Persónligar fyritøkur eiga í størri mun at verða javnsettar á skattaøkinum við partafelagsfyritøkur. Møguleiki skal verða fyri, at seta á stovn persónliga fyritøku við rætti til m.a. partafelagsskatting og frádrátti av útreiðslum, uttan at skula seta á stovn smápartafelag ella partafelag og gjalda stór innskot í hesum sambandi. Hinvegin kemur ein at hefta persónligt fyri krøv mótvegis persónligu fyritøkuni
- Ein íbirtaragrunnur skal setast á stovn, ið veitir byrjunarfígging til íbirtarar við góðum hugskotum

Eydnast at skapa hesar karmar er ongin ivi um, at Føroyar eftir fáum árum vildi fingið munandi fleiri virkisfýsnar føroyingar at luttikið í føroyska vinnulívinum og harvið fingið eitt munandi meira fjølbroytt og styrkt vinnulív.